# List í nýggja Skúlanum á Hamrinum á Argjum

**Tórshavnar kommuna hevur samtykt, at 1,5% av byggikostnaðinum skulu brúkast til at listprýða nýggjar bygningar hjá kommununi. Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu vil nú hava listafólk at koma við uppskoti at listprýða nýggja skúlan á Hamrinum á Argjum**

LIST
*Tíðindaskriv*

Hetta er aðru ferð at Listabólkurin bjóðar út tílíkt arbeiði. Fyrstu ferð var í nýbygda skúlanum við Løgmannabreyt, tá tikið var av tilboði frá Edwardi Fuglø.

Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu ynskir, at listin í nýggja skúlanum á Hamrinum verður fjølbroytt, fevnir um allan skúlabygningin og at fleiri listagreinar kunnu verða umboðaðar.

Listabólkurin hevur í huga teir mongu glasveggirnar í skúlanum. Tó útihýsir hetta ikki øðrum listarligum hugskotum.

Listabólkurin gera vart við, at talan er um listaverk, sum er í skúlaumhvørvi, har nógv fólk ferðast. Tí skal dentur verða lagdur á, at verkið skal taka seg væl út í tíðini frameftir.

Ein leistur er lagdur fyri útbjóðingina. Listafólk lata skitsuuppskot inn við frágreiðing um listaverkini. Í uppskotinum skal upplýsast, hvør kostnaðurin verður íroknað uppseting. Afturat hesum skal neyvt útgreinast, hvat tilfar verður nýtt.

Listaverk á glasveggjunum skulu vera liðug 1. apríl 2010. Onnur listaverk skulu vera liðug og uppsett í seinasta lagi 1. apríl 2011.

Listabólkurin skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu uppskotini ella einki at taka.

Tá Listabólkurin hevur tikið avgerð um, hvør verður biðin at gera listaverkið, verður sáttmáli gjørdur við viðkomandi listafólk, har treytir fyri avhending, uppseting, kostnað og aðrar treytir verða ásettar. Uppskotini skulu vera Listabólkinum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2010.

Kunningarfundur verður í Posthúskjallaranum í Tórsgøtu hósdagin 17. desember 2009 kl 17:00, har arkitektarnir og Listabólkurin hjá Tórshavnar kommunu greiða frá verkætlanini.

Fríggjadagin 18. desember kl 13:00 verður rundvísing á skúlanum, sum MAP Arkitektar skipa fyri. Tilfar um skúlan verður útflýggjað á fundinum. Annars kann tilfar fáast frá MAP Arkitektum, Jónas Broncks gøtu 5, Tórshavn, til 6. januar 2010. Jákup Simonsen, mentamálaleiðari svarar møguligum spurningum.


ART Listagluggin GALLERIE NÝGGJ FRAMSÝNING FRÍGGJADAGIN 11/12

týs. - frí..... 15.00 - 17.30
leyg:......... 11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu !

Ingálvur av Reyni • S.J. Mikines • Hans Hansen • J. Kampmann • Kruse • Waagstein • Z. Heinesen • Eyðun av Reyni • Astrid Luihn
Olivur við Neyst • Torbjørn Olsen • K. Svensson • Rannvá H. Mortensen • Frits Johannesen • Bárður Jákupsson • Øssur Mohr o. fl.

Virkisøkið hjá ART Gallerie – Listagluggin – er dygdargóð føroysk list. Listagluggin samarbeiðir við best umtóktu listafólkum í Føroyum við at sýna fram og selja list í Føroyum og uttanlands. Málið hjá Listaglugganum er á hollum støði at umboða og breiðum týdningi at vera »sýnisgluggi« úti og heima hjá føroyskari list. Listagluggin vil vera fremstur í sínum øki


Z. Heinesen


K. Svensson


H. Hansen


F. Johannesen


T. Olsen

**Listagluggin**
Dr. Jakobsensgøta 15 · Tórshavn
Tlf. 32 20 22 · Fartlf. 51 00 22
listagluggin@hotmail.com · www.listagluggin.com

**Dygdargóð føroysk list!**
Opið hvørja viku – alt árið!

Í samband við komandi framsýning lýsa vit eftir listaverkum – eldri sum nýggjum – eftir viðurkendum listafólkum.
Antin keypa vit listaverkini ella selja vit tey/tað fyri tygum.
Setið tygum í samband við okkum fyri at hoyra nærri.



**BILIN finnur tú hjá okkum**




Sosialurin / KvR 34 18 00

**Vit hava fult hús av brúktum bilum:**
- góðar og lítið brúktar
- bíligar og nógv brúktar

**Bilafígging**
einans 25% í útgjaldi

**Auto Service**
www.autoservice.fo






## SOUSCHEFUR TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir souschefi til galluna umborð á Norrönu at byrja 1. februar 2010.

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi arbeiði sum souschefur í einum altjóða umhvørvi.

**Vit vænta, at tú:**
- ert kreativur, lagaligur og hevur ábyrgdarkenslu
- hevur hug og evni at arbeiða saman við øðrum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert fleksibul og hevur gott sinnalag
- ert útlærdru gastronomiskur kokkur

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og krevjandi starv á einum stórum og fjølbroyttum arbeiðsplássi
- góðar umstøður og gott arbeiðsumhvørvið
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- arbeið og frítíð í lutfallinum 1 til 1

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt í samráð við Chef Manager.

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

Umsóknir og CV skulu sendast við teldupostI til hesa tilskrift innan mánadag 30. desember:

chef.manager@norrona.fo
Tel. 344850 / 344835

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Bretlandi, Beligu, Fraklandi, Hollandi, Italiu, Pólandi og Svøríki. Smyril Line hevur eisini tætt samstarv við samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.FO